# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Hanus Vilhelm:

## Triðja universitets prógvið

Hanus Vilhelm, ættaður úr Hoyvík, hevur tann 14. mai 2007 tikið prógv sum siviløkonomur, HD í fígging, á Ålborg Universiteti.

Frammanundan, í 2000, hevur hann haðani lokið prógv sum sivilverkfrøðingur við sergreinum innan virkisskipanir og í 2002 lokið prógv sum datalogur.

Til dagliga arbeiðir hann sum framleiðsluleiðari á stóru, altjóða hátøkni-fyritøkuni Coloplast A/S.

# Rannvá Holm Mortensen í Smiðjuni




Tann 17. mai Kristihimmalferðardag og fram til 23 mai, hevur Rannvá Holm Mortensen framsýning í Smiðjuni í Lítluvík.

Sýndar verða 24 nýprentaðar plakatir, og evnið er eitt úrslit av einum tríggjar mánaðar longum uppihaldi í India

Framsýningin letur upp 17. mai klokkan 15 til 18, og verður opin allar dagar somu tíðir, uttan leygardag, tá verður opið millum klokkan 13. og 18.





Bjørn á Heygum, sakførari:

# Einki út yvir tað vanliga

**Tzð er einki sum bendir á, at málið ikki er handfarið á vanligan hátt. Nakað annað er so, at tað nokk hevur verið naivt at hildi, at Jóannes Eidesgaard kann gera eina avtalu upp á nakkan av Heðini Mortensen, sigur Bjørn á Heygum, sakførari**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



Bjørn á Heygum, sakførari og fyrrverandi løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin, heldur ikki, at málið um nýggja landsstýrismannin hjá Sambandsflokkinum er handfarið øðrvísið enn vanligt er.

- Málið er viðgjørt innanhýsis í flokkinum, og har er mann so komin til eina niðurstøðu. Og tað er púra vanlig mannagongd, sigur Bjørn á Heygum.

Sakførtarin vísir á, at málið er íkomið, tí Bárður Nielsen vælsaktans hevur fingið eitt tilboð, sum hann ikki hevur kunna sagt nei til.

- Tað er einki sum bendir á, at tað liggja nakrar politiskar grundgevingar atanfyri, so í so máta kann ein bara gera sínar egnu niðurstøður um, hví hann valdi at leggja frá sær, sigur Bjørn á Heygum.

Hann heldur, at málið er handfarið eftir bókini, men tað var kortini ikki neyðugt hjá Kaj Leo Johannesen at fara út í æsir við grundgevingunum fyri, at hann ikki fór í landsstýrissessin kortini.

- Tað var ikki neyðugt at útbasunera tað, vísir Bjørn á Heygum á.

### Løgmaður onga heimild

Viðvíkjandi spurninginum um, hvør skuldi taka sætið á tingi fyri Kaj Leo Johannesen, heldur fyrrverandi tingmaður Sambandsfloksins, at tað var eitt sindur naivt at halda, at løgmaður kundi gera eina avtalu upp á nakkan av Heðini Mortensen.

- Heðin er valdur persónliga, og ein tingsessur fylgir ikki flokkinum, men tí, ið valdur er. Og løgmaður hevur onga heimild av gera nakra avtalu vegna Heðin Mortensen, sjálvt um teir nú eru í sama flokki, sigur Bjørn á Heygum.

Hóast tað nokk er í sambandi við spurningin um næsta mann á listanum, at menn eru farnir skeivir, so heldur Bjørn á Heygum kortini, at málið er rætt handfarið frá Sambandsfloksins síðu.

Bjørn á Heygum heldur, at vanlig mannagongd er nýtt í sambandi við nýggja landsstýrismannin.